# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 17. oktober 2024 |
| Mál nr.: | 24/09260 |
| Málsviðgjørt: | EHB |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um Mentanargrunn Landsins**
(Eftirløn afturat starvslønum og listafólkalønum og stuðul til framleiðslu av føroyskum tilfari til børn og ung)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000 um Mentanargrunn Landsins, sum broytt við kunngerð nr. 156 frá 12. desember 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 4, stk. 4 verður aftan á "stig 1" sett: ", umframt 15% í eftirløn."

**2.** Í § 4 a, stk. 5 verður aftan á "stig 1" sett: ", umframt 15% í eftirløn."

**3.** Aftan á § 5, men áðrenn yvirskriftina yvir § 6, verður sett:

*"Føroyskt tilfar til børn og ung*

**§ 5 a.** Stuðul til framleiðslu av føroyskum listaligum tilfari, eitt nú framleiðslu av tónleikatilfari og øðrum mentanarligum tilfari, sum kann íbirta og menna listaligu og málsligu evnini hjá børnum og ungum í einum føroyskum høpi, verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins.
*Stk. 2.* Nevndin ger sjálv av, hvørjar umsóknir sambært stk. 1 verða stuðlaðar, og hvussu stórur stuðulin skal vera í hvørjum einstøkum føri, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 3.* Stuðul verður ikki latin stovnum við alment fíggjaðum rakstri."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2025.

Almanna- og mentamálaráðið, dagfesting

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen